## Gistu í tunlum

Tað er ikki bara í Føroyum, at illveður hevur gjørt um seg. Lágtrýstið, sum gav illveður við Føroyar, gav eisini illveður í Danmark og Vesturnoregi. Í Danmark elvdi tann nógvi vindurin til, at sjógvurin fór upp um bryggjukantin í Limfjørðinum, og ferjur, sum sigla millum Danmark og Noreg, sluppu ikki úr havn. Í Noregi kavaði tað illa, og summastaðni á vesturlandinum noyddust fleiri bilførarar at gista inni í tunlum, til veðrið batnaði.

## Kjakast um brýr

Í Danmark eru politikarar og onnur farin at kjakast um, hvørt tað hevur størri týdning at gera eina brúgv millum Sjælland og Jylland ella ta ætlaðu brúnna um Femernsundið til Týsklands. Kjakið tykist tó longu hava fingið ein enda, tí stjórnarflokkurin Vinstri vil ikki hoyra talan um eina brúgv millum Sjælland og Jylland - ikki enn í hvussu er. Tey, sum eru køn í ferðsluviðurskiftum, hava kortini eina aðra áskoðan enn Vinstri í hesum málinum.

# Áhugaverdur aðalfundur hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir

**Nógv áhugavert kom fram á aðalfundi hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir leygardagin**

FÓLKAKIRKJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Meinigheitshúsið í Havn var leygardagin karmur um aðalfundin hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir. Nógv fólk vóru møtt til fundin og harímillum vóru eisini fleiri prestar.

Tummas Lauritssen er formaður í felagnum. Hann bjóðaði væl komin.

### Kirkjutíðindi yvirskot

Eftir hetta var formansfrágreiðing og roknskapurin á skránni. Málgagnið hjá felagnum, Kirkjutíðindi, er farið frá at geva undirskot til at geva eitt lítið yvirskot. Jógvan Fríðriksson er blaðstjóri á Kirkjutíðindi.

Millum annað var Jógvan á Lakjuni, ráðharri í kirkjumálinum, á fundinum og segði nøkur orð um yvirtøkuna.

Fólk fingu høvið at gera viðmerkingartiluppleggini, og nógv nýttu møguleikan.



*Bergur Berg frá Mentamálaráðnum svarar uppá spurning frá áhoyrarunum*

*Mynd: heinik*

### Norðmaður helt fyrilestur

Norðmaðurin Ove Conrad Hansen frá Missionshøjskolen í Norra segði nøkur orð um kirkjuligu støðuna í dag.

Hann vísti á, at tær klassisku siðbundnu kirkjurnar í dag eru í afturgongd, meðan tær nýggja kirkjurnar uppliva stóran vøkstur.



*Ove Conrad Hansen hugleiddi um kirkjuligu støðuna. Her sæst hann til høgru saman við Tummasi Lauritssen, formanni í Felagnum fyri Kirkjuráðslimir*

*Mynd: heinik*

Ove Conrad vísti á, at vit liva í einum postmodernaðum, altjóðagjørdum heimi, har ið avbjóðingarnar eru nakrar aðrar, enn tær hava verið hjá siðbundnu kirkjuni.

– Pluralisma, upploysn av absollutum virðum, urbanisering, samskifti og altjóðagerð eru lyklaorð í heiminum í dag, segði hann.

– Vit mugu læra okkum at »endurhugsa« (re-imagine), hvat ið tað merkir at vera kirkja. Mentanargrøvin er mangan líka stór millum aldursbólkarnar sum ímillum fólkabólkarnar.

– Um vit vilja vaksa sum kirkja, mugu vit hava eina vilja til nýhugsan, segði Ove Conrad at enda.

Summi høvdu á málið, at hetta var besti og mest opni fundur felagsins nakrantíð.

# Bispur fer frá í ár

**Á aðalfundinum hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir harmaðust nógv um, at lógararbeiði viðvíkjandi yvirtøkuni av Fólkakirkjuni ikki er nóg gott. Bispur almannakunngjørdi, at hann fer frá 1. november í ár. – Vánaliga arbeiðsgongdin við yvirtøkuni hevur skundað undir avgerðina, segði hann**

FÓLKAKIRKJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Eitt av høvuðsmálunum á aðalfundinum leygardagin var yvirtøkan av Fólkakirkjuni.

Fundarluttakararnir høvdu møguleikan at taka orðið, og fleiri nýttu hendan møguleikan.

### Ætlar møguliga úr kirkjuliga fylgibólkinum

Fleiri harmaðust um vánaligu arbeiðsgongdina við lógarsmíðnum. Bjarni Bæk tosaði við stórum orðum, og hann segði seg ivast í at fara úr kirkjuliga fylgibólkinum, sum er við í lógararbeiðnum, tí at alt verður koyrt ígjøgnum aftanfyri teirra rygg.

Fleiri onnur tóku orðið og søgdu seg kenna seg óvissan í, hvar vit enda, um Fólkakirkjan verður yvirtikin, áðrenn lógararbeiðið er liðugt.

Eitt uppskot um at senda eina yvirlýsing frá aðalfundinum til landsstýrið um at útseta yvirtøkuna av Fólkakirkjuni, varð felt. Tað var millum annað ført fram, at politiska avgerðin er longu tikin.

### Bispur fer frá í ár

Hans Jacob Joensen, bispur, kom við einari rættiligari bumbu á fundinum, tá ið hann almannakunngjørdi, at hann leggur frá sær 1. november í ár - eitt ár áðrenn upprunaliga ætlað.

– Tað, sum hevur skundað undir hesa avgerðina, er millum annað vánaliga stevið á arbeiðnum at yvirtaka Fólkakirkjuna. Eg orki ikki at stríðast við lógarsmíð í eitt ár afturat, segði bispur.



*Fleiri nýttu høvið at takka Hans Jacob Joensen, bispi fyri tíðina, nú ið hann fer frá 1. november*

*Mynd: heinik*

Fleiri prestar fýltust eisini á arbeiðið við at yvirtaka kirkjuna, men teir vóru ikki á einum máli um, hvussu støðan skal handfarast.

Tað er lítil ivi um, at kirkjuráðslimirnir kenna seg í leysari luft í mun til yvirtøkuna av Fólkakirkjuni, og at meirilutin hevði ynskt at fingið lógararbeiðið uppá pláss, áðrenn yvirtøkan varð framd í verki. Spurningurin er so, um politisku myndugleikarnir taka hetta til eftirtektar.